## Liljan Jakobsen formaður

Vága Fólkafloksfelag hevur fingið nýggjan formann. Á fundi hevur nevndin einmælt samtykt, at Liljan Jakobsen úr Miðvági skal taka við sum nýggjur formaður, skrivar Jóanis Nielsen á heimasíðu síni. Fyrsta tiltakið aftan á formansskiftið er ein fundur, sum verður í skúlanum á Giljanesi í morgin við løgtings- og landsstýrisumboðum hjá Fólkaflokkinum, og har er ætlanin, at fundarfólkið skal siga politikarunum, hvat tey halda um ymisk mál.



## Tónleikavikuskiftið í Keypmannahavn

Føroyahúsið í Keypmannahavn spennir seg út næsta vikuskiftið við risa konsert- og dansiskrá, nevyan hevur húsið á Vesterbrogade lagt pall til so nógv og stór tónleikanøvn. Lagt verður fyri fríggjakvøldið við konsertum við Eivør Pálsdóttir, Terja Rasmussen og Róki Jakobsen. Kvøldið endar við at Terji aftur fer á pall á einum náttkafé tiltaki. Leygarkvøldið 8. spetember er ikki minni spennandi, tá Høgni Lisberg, Jensina Olsen og Høgni Reistrup fara at spæla konsertir. Áðrenn kvøldið endar við dansi við Eyðuni Nolsøe. atgongumerki kunnu keypast í forsølu í Føroyahúsinum.

# Kreppa í samgonguni



*Ósemjan í verandi samgongu hevur ongantíð verri størri enn júst nú og líkist meiri og meiri eini politiskari kreppu*

*Savnsmynd*

**Nógv týðir uppá, at ósemjan í samgonguni hevur útviklað seg til eina veruliga kreppu. Hetta kom týðuliga til sjóndar í einum innslagi í Degi & Viku fríggjakvøldið. Nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er stóra stríðsevnið**

ANALYSA

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Samstarvið í samgonguni sær út til at vera álvarsliga hótt. Síðani Magni Laksáfoss í Sosialinum gjørdi vart við, at hann heldur tað vera óráðiligt at fara undir at byggja tunnil í Sandoynna og síðani hevur funnist at sjómansfrádráttinum,havanógvir samgonulimir funnist harðliga at honum fyri at føra síni sjónarmið í fjølmiðlunum, ístaðin fyri á samgonguog landsstýrisfundum.

Í einum innslagi í Degi & Viku fríggjakvøldið fær nýggi landsstýrismaðurin hjá Sambandsflokkinum ákoyringar fyri at vera kúrrur á landsstýrisfundum, men ístaðin brúka fjølmiðlarnar til at lufta síni sjónarmið.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur nú meldað seg í kórið av atfinnarum. Hann heldur ikki, at Magni Laksáfoss førir síni sjónarmið fram á landsstýrisfundum, sum hann átti, men ístaðin fer í fjølmiðlarnar við teimum.

- Eg haldi, eg kann siga við vissu, at hann ikki hevur tikið málið til viðgerðar har. Málið hevur verið uppi at venda undir ymiskt, men tað hevur ikki verið lýst og avgreitt soleiðis, sum vit hava sæð tað í fjølmiðlunum, sigur Bjarni Djurholm við Dag & Viku.

Sjálvur avvísir Magni Laksáfoss, at hann ikki hevur havt málið uppi innanhýsis í samgonguni.

- Eg havi tikið tað bæði upp á landsstýrisfundum og samgongufundum, og tað hava enntá verið samgongufundir um júst hetta. Her hava allir møguleikar verið til at spurt til míni sjónarmið, sigur Magni Laksáfoss við Dag & Viku.

Ónevndir tingmenn siga við sjónvarpið, at Magni Laksáfoss ikki skal hava verið so opinskáraður á samgongufundum.

John Johannesen heldur, at Sambandsflokkurin longu er farin í holt við eitt valstríð.

- Hetta er eitt beinhart valstríð, sum Sambandsflokkurin er farin í gongd við, og hann roynir at máa støðið undan samgonguni. Eg vil mæla Kaj Leo Johannesen til at lurta eftir sínum egnu orðum, har hann sigur, at Sambandsflokkurin altíð heldur gjørdar avtalur, sigur John Johannesen, sum tó sigur seg vera samdan í, at Sandoyartunnilin eigur at bíða. Kortini heldur hann, at ein loysn átti at verðið funnin innanfyri samgonguna.

Magni Laksáfoss heldur hinvegin, at málið eigur at kunna viðgerðast í fjølmiðlunum.

- Vit hava ein yvirupphitaðan búskap, og tað vita fólk. Hetta er tað mest týdningarmikla málið, sum vit hava júst nú. Hví kunnu vit so ikki diskutera hetta í fjølmiðlunum?, spyr Magni Laksáfoss og vísir á, at Vinnuhúsið nevnir tað, og fakfeløg og partafeløg nevna tað.

### Løgmaður júst afturkomin

Løgtingsval skal haldast í seinasta lagi 19. januar 2007. Stóri spurningurin er so, um verandi ósemja, ið nú sær út til at hava útviklað seg til eina veruliga samgongukreppu, kemur at bera í sær, at føroyingar skulu til val í úrtíð. Svarinum upp á hendan spurningin situr bert løgmaður við, og hann hevur higartil hildið fast við, at valið ikki kemur fyrr enn í januar, tá tað skal haldast. Tað ger Jóannes Eidesgaard, sum júst er komin aftur av ein tríggjar dagar almennari vitjan í Álandi, framvegis.

Hvat heldur tú um ákoyringarnar, sum Magni Laksáfoss fær frá til dømis Bjarna Djurholm, har hann endurgevur frá innanhýsis landsstýrisfundum og sigur seg ikki minnast, at landsstýrismaðurin skal hava tikið málið um Sandoyartunnilin upp, men heldur velur at fara til fjølmiðlarnar?

- Nú havi eg ikki sæð innslagið, so tað havi eg fyribils ikki nakrar viðmerkingar til?

Er samgongan í kreppu?

- Tað havi eg heldur ikki hug at gera nakrar viðmerkingar til beint nú. Lat meg líka koma í land av Norrönu, so eg fái møguleika at hugsa hetta nærri ígjøgnum, sigur Jóannes Eidesgaard í stuttari viðmerking til politisku støðuna.

# Maria Guttesen á Føroyaferð

**Um vikuskftið spælir Maria Guttesen tríggjar konsertir í Føroyum, við sær hevur hon kvinnuliga upphiting, Guðrið Hansdóttir og dóttir navframa danska trubadurin Sebastian**



TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hóskvøldið í Klaksvík, fríggjakvøldið á Tvøroyri og leygarkvøldið í Havn, talan verður stutt sagt um eina regulera Føroyar turné, tá Maria Guttesen við bólki og tveimum upphitingarnøvnum, fer á pall.

Fyrireikararnir leggja ikki fingrarnar ímillum, og siga at komandi konsertirnar í Føroyum fara at avdúka eina nýggja, slóðbrótandi Mariu, sum kennir seg tónlistarliga sterkari enn nakrantíð, og Føroyar fara at síggja eina ørvísi og fjølbroytna Mariu Guttesen, sum bæði fer at spæla gomul kend og nýggj løg.

Maria hevur dugnalig folk við sær: Maria syngur og spælir sjálv klaver/wurlizer, Morten Ærø spælir trummur, Søren Bigum spælir el-guitar, Tomas Raae spælir bass og Sophie Ziedoy syngir kór. Øll eru tey útbúgvin á tónleikakonservatorium

Maria hevur fingið góð ummæli í bæði føroyskum, donskum og eisini enskum fjølmiðlum. Løg hennara verða javnan spæld í útvarpi í Føroyum og øðrum londum.

Seinasta árið hevur Maria spælt nógvar smærri intimar konsertir í Danmark, eins og hon var í Føroyum seinasta summar og var høvuðsnavnið á Amnesty konsertini í desember. Tá hevði hon boðið fleiri kendum føroyskum tónleikanøvnum saman við sær á pallin.

### Kvinnulist og tónlistarlig eldsál

At hita upp fyri Mariu á konsertunum verða fløguaktuella Guðri Hansdóttir og danska Sara Grabow, ið er dóttir navnframa troubadourin Sebastian.

Maria er føroyski tónleikarin, sum veruliga hevur gagnnýtt síni framúrskarandi evnir at vegleiða, geva íblástur og coacha øðrum tónleikarum. Maria er ikki bert songkvinna, tónleikari, tónasmiður og tónleikalærari, hon er eisini nógv umbiðin sum tónleikaráðgevi.

Maria hevur givið tríggjar solofløgur út, har hon sjálv er sangari, tónleikari og produsari. Hon er sera fjølbroytt sum tónasmiður og løg hennara fevna frá barnasangum til power rock. Men líkamikið hvørjum Maria tónlistarliga arbeiðir við, so heldur hon fast um sína tónleikafilosofi og at tað skal verða hennara tónleikasál, sum er kjarnin í tónleikinum.

### Dreymar og kvinna

Maria uppteкur í hesum døgum sína dreymafløgu. Tað heilt serstaka við hesu fløgu er, at hon spælir øll instrumentir sjálv. Hetta er tí ein fløga, sum í allar mátar fær serstaka Mariu Guttesen ljóðið í hvønn krók og sum vísur ein sterka kvinnu við breiðum førleikum.

Konsertirnar í Føroyum vera í Atlantis í Klaksvík hóskvøldið 6., Klubbanum á Tvøroyri fríggjakvøldið 7. og Nordurlandahúsinun í Havn leygarkvøldið 8 september. Meira sæst um konsertirnar á www.nlh.fo og www.atlantis.fo, skriva fyrireikararnir.

Les meira um Mariu á www.mariaguttesen.dk.